# Miðnámsrit

8 desember 2015

## Um blaðið

Góði lesari!

Her er áttanda Miðnámsrit. Hesa ferð eru fimm greinir. Telefonir eru stór avbjóðing á miðnámsskúlunum. Heðin Lamhauge hevur skrivað eina grein um telefon(mis)nýtslu á miðnámi.

Olav Absalonsen hevur eina grein um, hvussu lærugreinin virkisbúskapur er broytt frá sjeytiárunum til nú. Hetta er søgan um eina lærugrein, sum hevur havt næstan 20 nøvn hesi árini.

Tórður Johannesarson hevur skrivað eina grein um toymisarbeiði og fundir. Summir lærarar hava ta áskoðan, at gott toymisarbeiði er bygt á nógv fundarvirksemi. Tórður setir spurnartekin við hesa fatan.

Í løtuni taka nakrir lestrarvegleiðarar masterútbúgving í vegleiðing, sum varð boðin út á fyrsta sinni í 2013. Elisabeth Holm hevur skrivað um útbúgvingina.

Viðtal er við íslendskan lærara, sum undirvísir á einum miðnámsskúla í Reykjavík.

Blaðstjórn: Olav Absalonsen og Tórður Johannesarson

# Innihaldsyvirlit

**Telefonisk innrás og tøkniligir fótonglar, Heðin Lamhauge** 3

**Virkisbúskapur – hvat er tað? Olav Absalonsen** 8

**Toymisarbeiði – uttan fundir, Tórður Johannesarson** 14

**Masterútbúgving í vegleiðing á Fróðskaparsetri Føroya, Elisabeth Holm** 19

**Viðtal við íslendskan miðnámsskúlalærara, Tórður Johannesarson** 25

# Telefonisk innrás og tøkniligir fótonglar –
## hugleiðing um telefon(mis)nýtslu hjá næmingum á miðnámi

Heðin Lamhauge

**Millum lærarar á miðnámi í Føroyum og grannalondum okkara hevur síðstu árini verið vaksandi órógv (frustratión) at hóma. Partur av orsøkini er tøkniliga flóðaldan, sum skolar yvir skúla og heim í hesum døgum. Tøkni í skúlanum er nýggja gandaorðið, ið skal loysa flestu trupulleikar. Tað, ið áður kallaðist tøknilig nýtsla við tøknini sum amboð, broytist í løtuni til tøkniliga misnýtslu millum næmingar. Tøknin í sjálvari sær sleppur ókritiskt at seta dagsskrá uttan námsfrøðiliga haldgóðar grundgevingar, meðan lærarar hyggja at og hava torført at síggja sín leiklut í einum nýggjum talgildum veruleika.**

Greinin er ein hugleiðing, ið byggir á hetta uppáhald: *Óstýrd (av lærara) nýtsla av tøkni, t.e. fartelefonini í undirvísingini, órógvar og forðar í stóran mun fyri læring hjá næminginum.*

Tá ið evnið í greinini er tøkninýtsla hjá næmingum, ynski eg at vísa til áhugaverdu greinina ”Ávegis til talgildan demens” hjá Gitte Klein, ið er at lesa í sætta Miðnámsriti, juni 2015.

”Come on, eg dugi tað ikki!”, ”áh man, sum hetta er strævið!”, ”sig mær úrslitið, eg tími ikki at bíða, til vit gjøgnumganga uppgávuna!”.

Vit kenna hesar útsagnir hjá ørkymlaðum næmingum. Tað sýnist, sum rímiliga stórur partur av næmingunum ikki trívast í læringstilgongdini, ið mangan er krevjandi og strævin. Ein ”jalig frustratión” er natúrlig kensla í læringstilgongdini. Brúgvin frá tí kenda og trygga til tað nýggja og ókenda er ymisk í longd hjá okkara næmingum. Men fortreytin fyri læring er, at næmingurin má ígjøgnum metamorfosuna, tað vil siga broytingina frá ikki at vita til at vita. Úrslitið, tá ein kemur yvirum hinumegin, er vitan og innlit. Frustratiónin verður býtt um við gleði og økt sjálvsálit, og næmingurin hevur flutt seg upp á hægri (ella djúpari) vitanarstig.

Tað er týdningarmikið, at næmingurin fær frið á ferðini yvir um brúnna og gevur sær stundir at uppliva frustratiónina og metamorfosuna og síðan njóta útsýnið og tilveruna á tí hægra vitanarstiginum. Uppgáva lærarans er at stuðla honum í hesi spennandi og

avbjóðandi ferð. Ein partur av stuðlinum liggur í at slóða fyri og rudda tað av vegnum, ið kann órógva læringina. Harafturat er tað grundleggjandi, at næmingurin gongur leiðina so sjálvstøðugt sum gjørligt. Hann eigur sjálvur at uppliva at flyta seg frá A til B og síðan síggja og meta um heimin út frá nýggju støðuni.

## Telefoniska innrásin og undirhald

”Bip, bip og blink, blink”. Telefonin hjá næminginum sendir sínar freistandi geislar út, so at øll uttan fyri skúlan bjóða til samskifti, alt meðan næmingurin er í holt við at førka seg í læringstilgongdini. Hann letur seg freista, kannar telefonina og kjakast eina løtu við onkran. Hetta ger, at hann meldar seg mentalt úr felagsskapinum eina løtu, og læringin verður órógvað. Vandin er, at hann fær trupult við at fylgja við restina av tímanum. Síðstu árini eru slík telefonisk órógv vorðin alt meiri vanlig bæði í fólkaskúlanum og á miðnámi.

Úrslitið av telefonisku innrásini er, at næmingar í hópatali melda seg mentalt úr felagsskapinum fyri at fara inn í ”annan heim” og síðan koma aftur løtu seinni. Hvat hendir við læringini, tá ið okkara næmingar í størri mun multitaska, eru til staðar í undirvísingini, men fara samstundis í tíð og ótíð inn í annan heim?

Órógvin liggur sjálvandi ikki í tøknini, men í teimum møguleikum, at teir støðugt verða kopladir til umheimin og alheims undirhaldið. Tá næmingurin flytur seg í lærings-tilgongdini, og natúrliga frustratiónin kemur, er tað freistandi at leypa upp um garðin, har hann er lægstur, og flýggja út á (ó)sosialu miðlarnar ella lata seg tøla av spølum fyri at sleppa undan neiligu kensluni av jaligu frustratiónini. Læringstilgongdin verður avbrotin, og næmingurin verður verandi á sama vitanarstigi sum áður.

Um nú undirhaldsvirðið í ”øðrum heimi” er hægri enn undirhaldsvirðið í flokshølinum, nær ”checkar” næmingurin so innaftur í flokkin? Støðan minnir ikki sørt um science-fiction a la Matrix, har persónar kunnu flyta ímillum ymsar heimar og dimensiónir. Skulu vit sum lærarar økja um undirhaldsvirðið í undirvísingini í kapping við til dømis (ó)sosialar miðlar og harvið royna at lokka næmingin at gerast virknan aftur í tímanum? Tað sýnist at vera ein vónleys kapping, tí at lærarin verður helst altíð tann stóri taparin í slíkari kapping!

Lærarin heldur fram ”í pensum” og vónar, at næmingurin hevur fingið fatur á nýggju vitanini/innlitinum í evnið, men veruleikin er, at fleiri og fleiri næmingar eru framvegis á sama stigi og hava ikki flutt seg, sum vónað varð. Hvussu ofta hava vit sum lærarar ikki suffað og sagt: ”Hví duga næmingarnir hetta ikki enn, eg havi jú gjøgnumgingið hetta fleiri ferðir, bæði á talvu, í bólkaarbeiði, framløgum, filmi o.s.fr.?”. Orsøkirnar kunnu sjálvandi vera fleiri, men núverandi (mis)nýtsla av tøkni eigur uttan iva sín leiklut.

## Hvat varð av floksleiðaranum?

Ongantíð áður hevur møguleikin fyri talgildum hjálpitólum í undirvísingini verið størri enn í dag. Hetta setir serlig krøv til læraran, sum er settur leiðari av flokkinum. Hvørja tøkni skal hann brúka, og hvat er námsfrøðiliga grundgevingin? Við vaksandi tøkniligu freistingunum, veksur eisini trýstið á læraran at undirvísa tilvitað við námsfrøðiligari grundgeving. Lærarin má seta sær sjálvum spurningar, sum ikki vóru neyðugir fyrr. Nýggjar tíðir við nýggjari tøkni krevur, at hann gerst meira tilvitaður og kemur fram til námsfrøðiligar grundgevingar fyri valinum av hjálparamboðum í undirvísingini. Tað hevur týdning, at lærarin tekur leiklutin sum floksleiðari upp á seg og torir at gera av, hvørji tøknilig amboð skulu verða brúkt í flokkinum, og vraka ta tøknina, sum kann vera fótongul fyri næmingarnar.

Myndugleikar og skúlaleiðslur hava ábyrgdina av at førleikamenna lærararnar til at skilja núverandi og komandi tøkniligar møguleikar og forðingar.

## Svinghurða-mentanin

Hvat hevði lærari og skúli sagt, um 10-30% av næmingunum javnan og uttan givna orsøk fóru út úr flokshølinum, og komu aftur løtu seinni? Í hesum føri hví ikki seta upp kovboy-sligar sving-hurðar inn í flokshølini, soleiðis at tað gerst so ómakaleyst sum gjørligt hjá næmingunum at ganga inn og út úr undirvísingini? Eg haldi, at hetta er meir ella minni veruleikin í mongum miðnámsskúlum nú á døgum. Vit mæla næmingunum til at avmarka fysisku fráveruna mest møguligt. Hví verður mental frávera vegna tøkniliga misnýtslu ikki mett á sama hátt sum fysisk frávera? Mental frávera minnir ikki sørt um fysiska fráveru, tá tað kemur til læring hjá næmingunum.

Tað var ein áhugaverdur og viðkomandi fyrilestur á Føroya Handilsskúla fyrr í ár, sum einir 150 næmingar lýddu á. Eg setti mær fyri at eygleiða telefonnýtsluna hjá næmingunum undir fyrilestrinum. Tá ið tiltakið byrjaði, vóru ongar telefonir at hóma, og næmingarnir lurtaðu áhugaðir. Eftir 10-15 minuttir komu fyrstu telefonirnar upp úr lummunum, og stutt tíð gekk, til 20-30% av næmingunum mentalt høvdu meldað fráveru og sótu sum trælir og hugdu inn í skíggjan, alt meðan framúr fyrilestrarhaldarin eldhugaður tosaði við tey 70-80% av næmingunum, ið mentalt vóru til staðar.

Skal ein skúli góðkenna eina slíka støðu? Nær tekur ein skúli hesi viðurskifti í álvara og ger felags mannagongdir fyri allar næmingar og allar lærarar? Hvør fyritøka hevði góðtikið, at 20-30% av teirra menniskjaliga tilfeingi eina og hvørja tíð var óvirkið?

## Kanning av næmingunum

Men hvat siga næmingarnir sjálvir um nýtslu av telefonini í undirvísingini? Er nýtsla av telefonini í tímunum ein fortreyt fyri læring? Halda næmingar, at telefonin er eitt hent amboð í undirvísingini?

Eg ynskti at hyggja nærri at hesum og gjørdi eina kanning í tveimum flokkum á Búskaparbreytini á Handilsskúlanum í Havn. Undan kanningini hevði eg í tveir mánaðir javnan latið næmingarnar lagt telefonina frá sær í tímunum. Tað vil siga, at teir vóru nú rímiliga vanir við at leggja telefonina frá sær í mínum tímum.

Kanningin vísti í stuttum, at:

- Næmingarnir hava lætt við at leggja telefonina frá sær í tímanum, men halda ikki, at skúlin skal skipa tað sum fasta mannagongd allar tímarnar.
- Næmingarnir eru sum heild samdir í, at læringin styrkist, um telefonin verður løgd til viks í undirvísingini.
- Næmingarnir eru ósamdir í útsøgnini, at telefonin styrkir um læringina.
- Næmingarnir ynskja ikki, at eingin stýring er við telefonnýtsluni í tímunum.
- Facebook og Snapchat eru mest vitjaðu síðurnar, tá flýggjað verður út á internetið í tímunum.
- Telefonin verður millum lítið og einki brúkt sum amboð í undirvísingini (galdandi fyri allar lærugreinir).
- Næmingarnir lesa millum sjáldan og ongantíð longri tekstir (longri enn tvær A4 síður) á telefonini.

## Niðurstøða

Telefonin er í sjálvari sær hvørki fyrimunur ella vansi í mun til læring hjá næmingunum. Talan er heldur um, hvat ið telefonin (ella onnur tøkni) verður nýtt til. Ábyrgdin og avgerðin um, hvat amboð skal nýtast, liggja hjá lærara (og leiðslu). Tørvurin á tilvitaðum raðfestingum kemur framyvir at vaksa proportionalt við tøkniligu menningini. Hetta setir serlig krøv til lærarahóp og leiðslur.

Við vaksandi (mis)nýtslu av telefonini í tímunum er hugsandi, at læringin hjá næmingunum verður í stóran mun órógvað og í ávísan mun tarnað. Tørvurin á týðiligari floksleiðslu verður ikki minni í framtíðini, nú tøknin kemur sum flóðalda inn yvir skúla og heim.

Kanningin vísti, at næmingar eru ikki ímóti at fáa mótstøðu (floksleiðslu) viðvíkjandi telefonnýtsluni í tímunum. Teir ásanna samstundis, at telefonin kann vera ein órógvandi lutur í undirvísingini. Royndir av, at næmingar løgdu telefonina frá sær í undirvísingini –

og harvið kundu hugsavna seg um læringina –, vístu, at hetta væl letur seg gera uttan mótstøðu frá næmingunum. Kanningin vísti eisini, at telefonin als ikki verður brúkt sum amboð í undirvísingini í nakrari lærugrein.

## Tilmæli

Mælt verður til, at leiðslur og myndugleikar ikki lata dagsins ódefineraðu og partvíst tilvildarligu nýtslu av tøkni halda fram. Møguleikarnir eru tveir: antin at hjálpa næmingunum at leggja órógvandi hentleikar (íroknað telefonina) frá sær í tímunum ella at menna eina ætlan og menna førleikarnar hjá lærarum og næmingum at nýta útvaldar hentleikar sum skilagóð amboð til frama fyri læringina. Í løtuni sær fyrri møguleikin út til at vera meira sannlíkur at eydnast, men tann seinni kundi verið spennandi at roynt.

# Virkisbúskapur – hvat er tað?

Olav Absalonsen

**Virkisbúskapur er ein av høvuðslærugreinunum innan handilskap á handilsskúlanum. Her verður greitt eitt sindur frá, hvat henda lærugrein inniheldur í dag. Vit fara nakað aftur í søguna at greiða frá, hvussu lærugreinin hevur itið fyrr, og hvussu hon hevur fingið tað navnið, sum hon hevur í dag. Hon hevur havt eini 20 nøvn, men tað kemur eisini av, at hon er sett saman av evnum, sum fyrr hava verið í fleiri lærugreinum. Virkisbúskapur er sostatt ein samanseting av evnum sum roknskapi, logistikki, strategi, fíggjarstýring, fíggjarætling og øðrum.**

Sjálv lýsingin av lærugreinini verður býtt sundur í tvey. Tann fyrri parturin er um Virkisbúskap á C-stigi, sum er lærugrein á FHS, og sum er sprottin úr tí siðvenjuni, sum var fyrst í HMX (handilsmedjálparaprógv) og síðani FHS (støðisútbúgving innan fyrisiting, handil og skrivstovu). Tann seinni parturin er um Virkisbúskap á B-stigi og A-stigi, sum eru lærugreinir á Búskaparbreytini, og sum eru sprotnar úr tí siðvenjuni, ið hevur verið á HH (hægri handilsprógv). Av tí at hetta er ein lærugrein á trimum stigum, verður hon, sum sæst, ofta umtalað sum tríggjar lærugreinir við sama navni, men við trimum ymiskum bókstavum aftanfyri.

Virkisbúskapur er ein lærugrein, har vit hava nógv føroyskt tilfar, við tað at nógvar føroyskar bøkur finnast í lærugreinini, men eisini tí at vit kunnu brúka ársfrásagnir hjá føroyskum partafeløgum í undirvísingini. Tað føroyska fakmálið er sterkt í virkisbúskapi, har vit eisini nýta fremmandaorð, tá ið vit halda, at tað er meira hóskandi. Ein partur av lærdóminum í virkisbúskapi er eisini at duga eingilska terminologi fyri týðandi hugtøk, tí tað gevur atgongd til sera nógv tilfar á netinum. Hetta kann vera hent at duga, tá ið næmingarnir skulu skriva ritgerðir, men tað er ikki minni hent, tá ið teir eru lidnir við skúlan og skulu brúka skúlalærdómin at byggja meiri lærdóm uppá, so hvørt sum teir hava brúk fyri tí í víðari útbúgving ella í arbeiðslívinum.

## Virkisbúskapur C

Á C-stigi er virkisbúskapur í dag samansettur av 5 høvuðsevnum:

1. Virkið og samfelagið
2. Búskaparligir upplýsingar um virkið
3. Búskaparlig greining av virkinum
4. Búskaparligar avgerðir í virkinum
5. At leggja til rættis og gera ætlanir

Hetta innihaldið er úrslit av einari langari siðvenju, sum lærugreinin hevur havt í HMX og síðani 1983 í FHS. Myndin niðanfyri er ein roynd at vísa, hvørji lærugreinanøvn fyrr hava verið innan tað, sum nú eitur Virkisbúskapur C. Í HMX vóru tvær lærugreinir innan hesi øki: Bókhald og Rokning. Seinni vóru nøvnini broytt til Bókhald við roknskaparfatan og Rokning við maskinrokning. At roknskaparfatan kom inn í navnið, var helst fyri at vísa á, at næmingurin eisini skuldi fata nakað av bókhaldi og roknskapi og ikki bara venja bókingar. Maskinrokning var partur av roknifakinum, áðrenn hon kom inn í sjálvt navnið, men her skulu vit hugsa um, at hetta er í tí tíðini, tá ið teldur ikki stóðu á nøkrum skrivi-borði, og tá ið tað tí hevði týdning at hava venjing í at rokna skjótt við roknimaskinu. Í dag er hetta lagað til tíðina, soleiðis at rokniark er eitt týðandi amboð í virkisbúskapi. Í HMX vóru bæði fakini seinni løgd saman í eitt fak undir navninum Rokning og roknskapur.




Í FHS, sum byrjaði í 1983, høvdu vit lærugreinirnar Roknskapur og Rokning (rokning í hesum sambandi er ikki tað sama sum støddfrøði, sum var og er ein onnur lærugrein á FHS). Í 1985 varð navnið á Roknskapi broytt til Bú- og roknskapur, og var hetta ein

ábending um, at nú var innihaldið víðkað nakað. Kortini varð Rokning varðveitt sum sjálvstøðug lærugrein til 1991, tá ið lærugreinirnar vórðu lagdar saman í eina lærugrein undir navninum Bú- og roknskapur. Í 1998 fekk lærugreinin navnið Virkisbúskapur C.

## Virkisbúskapur B og A

Í virkisbúskapi á B- og A-stigi eru í dag 6 høvuðsevni:

1. Vinnulív og samfelag
2. Virkisstrategi
3. Roknskaparfrøði – búskaparlig upplýsing
4. Búskaparlig greining
5. Búskaparlig stýring – og avgerðir
6. Fíggjarætling

Samanborið við C-stig er eitt høvuðsevni komið afturat, og er tað virkisstrategi. So hvørt sum nemingurin kemur upp á hægri stig í lærugreinini, verða evnini víðkað, og farið verður djúpari niður í hvørt evni. Eins og á C-stigi er lærugreinin sett saman av nógvum fyrrverandi lærugreinum. Myndin niðanfyri er ein roynd at vísa, hvørji lærugreinanøvn í HH hava verið fyrr innan tað, sum nú eitur Virkisbúskapur B og A.

Fyri 1975 vóru Roknskaparlæra og Rakstrarbúskapur hvør sítt fak bæði árini á HH. Hetta árið kom eitt nýtt felagsfak fyrra árið undir navninum Roknskaparlæra/rakstrarbúskapur, men tær báðar lærugreinirnar vóru framvegis hvør sær tað seinna árið. Ein nýggj lærugrein við navninum Rakstrar- og framleiðsluteknikkur kom eisini í 1975. Við nýggju kunngerðini í 1986 helt Roknskaparlæra/rakstrarbúskapur fram sum lærugrein tað fyrra árið á HH, men tað seinna árið kom nýggj lærugrein fyri undir navninum Økonomistýring við ella uttan støddfrøði, og lærugreinirnar Roknskaparlæra og Rakstrarbúskapur duttu burtur. Samstundis varð evnið marknaðarførsla tikið úr lærugreinini, og Sølubúskapur varð nýggj lærugrein á HH.

Í 1993 kemur nakað av tí gomlu skipanini afturíaftur. Roknskaparlæra/rakstrarbúskapur fær nýggja navnið Roknskaparlæra og virkisbúskapur B, men tað seinna árið fáa vit trý valfak í staðin fyri Økonomistýring; tey eru Uttanhýsis búskaparkunning A, Roknskaparlæra og virkisbúskapur A og Framleiðslubúskapur A, ið svara nøkulunda til tey trý fakini Roknskaparlæra, Rakstrarbúskapur og Rakstrar- og framleiðsluteknikkur, ið høvdu verið fyri 1986. Í 1996 fær lærugreinin Roknskaparlæra og virkisbúskapur núverandi navnið Virkisbúskapur – bæði á B- og A-stigi, men Uttanhýsis búskaparkunning A og Framleiðslubúskapur A eru framvegis til sum lærugreinir. Í 2000 verður Framleiðslubúskapur A lagdur saman við Virkisbúskap A, og Uttanhýsis búskaparkunning fær navnabroyting til Ársroknskap A. Í 2010 verður Ársroknskapur A lagdur saman við Virkisbúskap A í eina lærugrein undir navninum Virkisbúskapur A.




## Føroyskt undirvísingartilfar

Hóast FHS-útbúgvingin var føroysk frá byrjanini í 1983, nýtti skúlin í byrjanini danskar námsætlanir og danskar próvtøkuuppgávur. Men hetta kundi bara vera ein fyribils loysn, og áðrenn 80'ini vóru liðin, høvdu vit fingið føroyskar námsætlanir í Bú- og roknskapi og í rokning á FHS. Somuleiðis vórðu próvtøkuuppgávurnar eisini føroyskar. Tí var upplagt at fara undir at gera føroyskt undirvísingartilfar. Heðin Samuelsen, sum var stjóri á Føroya Handilsskúla til 1986, var íðin at dyrka og røkta føroyskt fakmál á økinum, og onkursvegna var hetta ein eldhugi, ið smittaði onnur, ið ikki vóru mótstøðufør ímóti hesum.

Í 1990 kom uppgávubók í roknskapi og búskapi, sum vit báðir Árant Olsen høvdu skrivað. Í 1993 kom grundbók í roknskapi og búskapi. Í báðum førum høvdu vit brúkt tilfarið í undirvísingini, áðrenn tað varð givið út. Onnur og broytta útgáva av uppgávubókini kom í 1993, og onnur óbroytta útgáva av grundbókini kom út í 1997. Í 2000 kom triðja útgáva av

bæði grundbók og uppgávubók. Hesa ferð hevði Finn Jensen staðið fyri uppgávubókini. Føroya Skúlabókagrunnur gav allar hesar bøkurnar út.

Hugskotið við teimum føroysku bókunum var, at tær skuldu ikki vera dagsaktuellar, men at tær skuldu innihalda tað mest grundleggjandi í fakinum; tí brúktu vit orðið grundbók. Bøkurnar skuldu sostatt hava eitt varandi virði. Í undirvísingini var so meiningin, at lærarar skuldu finna ella gera tilfar, sum var dagsaktuelt, og sum verður skift út á hvørjum ári. Um vit skuldu havt aktuell dømi í bókunum, høvdu tær verið ov gamlar eftir tveimum árum.

Tá ið HH kom undir føroyska lóggávu í 1993, og vit fingu føroyskar námsætlanir og próvtøkuuppgávur, var farið í gongd við at gera føroyskt tilfar til Virkisbúskap B. Hugskotið var tað sama, og tilfarið varð brúkt í undirvísingini í fleiri ár, áðrenn tað varð givið út. Virkisbúskapur til B-stig kom út sum 4 grundbøkur við uppgávuheftum árini 1999-2004. Heðin Samuelsen og eg skrivaðu hesar 4 bøkurnar: Virkið, Kostnaðarlæra, Fyriskipan, Bókhald og ársroknskapur. Føroya Skúlabókagrunnur gav eisini allar hesar bøkurnar út.

Eftir hetta fóru vit í holt við A-stig í virkisbúskapi og ársroknskapi. Í 2007 komu tvær bøkur út sum royndarútgávur: Ársroknskapur, sum Finn Jensen stóð fyri, og Fíggjarstýring, sum eg stóð fyri. Tá ið royndarútgávurnar høvdu verið brúktar í nøkur ár, komu nýggjar og nógv broyttar útgávur í 2010 undir nøvnunum Roknskaparfrøði og Fíggjarstýring. Føroya Skúlabókagrunnur gav út. Sum sæst, hevur Skúlabókagrunnurin roynst okkum væl. Leiðarar á stovninum hesi árini vóru Helenu Dam á Neystabø og Heðin M. Klein, sum altíð vístu okkum stóra vælvild. Ritstjórar vóru Tollakur Djurhuus og seinni Birgir Kruse, sum vit høvdu framúr gott samsarv við.

## Innihaldið í lærugreinini

Tey mongu nøvnini á lærugreinum, ið hava verið innan virkisbúskaparliga økið, samanleggingar og sundurskiljingar siga nakað um meldurin í handilslærugreinum sum heild, og sjálvt um evnini eisini eru flutt ímillum og skild sundur, so hevur eisini verið stór broyting í innihaldinum í lærugreinini. Tað verður ov drúgt at greiða frá øllum, men vit kunnu siga nakað um tær seinastu broytingarnar.

Við kunngerðini í 2013 og nýggjum námsætlanum á øllum stigum vóru ávísar broytingar á B-stigi. Fyriskipan, sum hevði verið eitt rímiliga stórt evni í fakinum síðani mitt í 90'unum, varð tikið burturúr, og í staðin kom strategi í fyritøkum inn í lærugreinina. Hetta var grundað á, at fyriskipan ella organisatión er ein vallærugrein í Búskaparbreytini, og heldur ikki er hon serliga búskaparlig, meðan strategi er nógv meira viðkomandi í sambandi við búskaparligar avgerðir. Strategisk evni eru eisini í Sølubúskapi, so her

verður nakað av dupultari undirvísing, men hinvegin leggur hetta eisini upp til samstarv og samskipan av læringini.

Logistikkurin fyllir eisini meira á B-stigi enn fyrr. Á ein hátt er talan um, at hetta evnið er flutt frá A-stigi til B-stig. At bæði logistikkur og strategi fylla meira á B-stigi enn fyrr, er ein fyrimunur, ið kemur til sjóndar, tá ið flokkurin fer á virkisvitjan, tí umboð fyri leiðslur í virkjum koma ofta inn á hesi evni, og tað er gott, at næmingarnir síggja, at tað, sum tey læra í skúlanum, hevur samband við lívið uttan fyri skúlan. Mikrobúskaparlig teori er nógv minkað á B-stigi, og partar av hesum eru fluttir upp á A-stig, sum er vallærugrein. Tað er vist eisini skilagott, tí talan er um evni, ið eru rættiliga teknisk og matematisk.

Roknskapur fyllir framvegis nógv á B-stigi, har dentur verður lagdur á roknskaparfatan. Tí brúka vit í ávísan mun ársfrásagnir hjá partafeløgum sum undirvísingartilfar. Men bókførsla er ikki partur av førleikamálunum longur; grundgevingin fyri hesum er, at tað at venja bókingar er nakað, sum ein kann læra í praksis, og tað er burturspilt tíð at venja slíkt í skúlanum, tí tey flestu skulu ikki verða bókhaldarar. Hinvegin kann verða ført fram, at bókhaldið er keldutilfarið til roknskapin, og tað kann samanberast við háttalæru í einum faki. Tá ið tú lesur eina ársfrásøgn hjá einum partafelag, veitst tú, at dokumentatiónin fyri roknskapinum er at finna í bókhaldinum, og um dokumentatiónin er ivasom, verður roknskapurin eisini ivasamur.

Bókhald í Handilsskúlanum skal ikki lærast sum venjingar til eina próvtøku, men heldur sum ein matematisk algoritma. Bókhald kundi tað sama verið eitt evni í støddfrøði. Í hesum sambandi er áhugavert at nevna, at fyrstu ferð bókhald er lýst í bók, sum er givin út, var í 1494, tá ið fransiskanaramunkurin Luca Pacioli í bókini *Summa de arithmetica, geometria, proportioni et proportionalita,* ið var ein bók í støddfrøði, hevði ein kapittul um bókhald. Hann hevði verið húslærari hjá einum keypmanni í Venesia, og har hevði hann lagt til merkis og sett seg inn í, hvussu keypmenninir har á ein skipaðan hátt førdu bøkur fyri at halda skil á inntøkum, kostnaði, ogn, skuld og eginpeningi. Bókin hjá Pacioli varð skjótt umsett til onnur mál, og dupulti bókhaldshátturin, sum vit framvegis kenna hann, spjaddist úr Italia til onnur lond.

Pacioli var kendur fyri at leggja dent á at brúka teori í praksis. Og við síni lýsing av bókhaldi teoretiseraði hann eina skipan, sum praktikarar høvdu uppfunnið. Í virkisbúskapi sum í øðrum lærugreinum á handilsskúlanum er einki so praktiskt sum ein góð teori.

# Toymisarbeiði – uttan fundir

Tórður Johannesarson

**Í fjør hevði eg eitt upplegg á námsfrøðiliga tiltakinum á Føroya Handilsskúla, sum hevði heitið: *Hvussu kunnu vit menna toymsiarbeiði á Føroya Handilsskúla?***

**Mítt útgangstøði var, at toymisarbeiði hevur nógvar fyrimunir, m.a. at einstaki lærarin veit, at hann hevur leiðslu og starvsfelagar aftan fyri seg, tá ið avgerðir skulu takast, og okkurt stingur seg upp í einum flokki. Hvør einstakur lærari kennir seg sum part av einum felagsskapi – hetta skapar styrki.**

**Um toymisarbeiði skal eydnast, so má samskifti eisini vera gott, tí øll í toyminum mugu vita av hvørjum øðrum. Eg havi ta fatan, at summir lærarar halda, at besta samskifti í sambandi við toymisarbeiði eru fundir og fundar-virksemi. Fundir kunnu vera góðir í sambandi við toymisarbeiði, men tað ber eisini til at hava fruktagott toymisarbeiði uttan stórvegis fundarvirksemi.**

Seinastu árini hevur nógv verið frammi, at tað er neyðugt, at lærarar mugu arbeiða saman í einum toymi. Fyrr kundi ein lærari leggja líka í, hvat aðrir lærarar gjørdu, tí hann visti – ella helt seg vita –, at hansara undirvísing riggaði, og hann læt ikki royndir frá sær til starvsfelagar. Hesin varð kallaður privatpraktiserandi lærarin. Tað er ikki pláss fyri hesum slagi av lærara longur, og eingin vil verða kallaður ein privatpraktiserandi lærari nú á døgum[1].

Mentamálaráðið hevur varnast, at toymisarbeiði mennir bæði næmingar og lærarar, tí at sambært nýggju gymnasialu skipanini er tað álagt lærarum at arbeiða í toymum. Hugsanin aftan fyri toymisarbeiði er, at einstaki lærarin mennist fakliga og námsfrøðiliga, tí at lærarin fer út um sítt egna fak og býtir sína námsfrøðiligu og fakligu vitan við toymið og fær samstundis vitan frá hinum í toyminum. Hetta kemur sjálvsagt eisini næmingunum til góðar, tí at teir fáa eina vitan um, at lærdómur ikki hevur nøkur fakmørk.

## Ymisk sløg av læraratoymum

Vit kunnu hava fleiri sløg av toymum. T.d. kunnu tríggir FHS-flokkar vera eitt toymi. Flokkar á øðrum ári kunnu t.d. vera eitt toymi o.s.fr.. Á flestu skúlum eru eisini faktoymi, har lærarar, ið hava somu lærugrein, eru í einum toymi. Eitt annað slag av toymi er

[1] Sí Miðnámsrit nr. 5 "Námsfrøðilig leiðsla"

kjarnutoymi. Eg ætli mær ikki í hesi grein at koma nærri inn á hesi toymi, men leggja dent á flokslæraratoymi. Hetta slagið av toymi er, at lærarar, sum hava ein flokk, eru eitt flokslæraratoymi. Tað eru bæði fyrimunir og vansar við einum slíkum toymi. Vansarnir kunnu vera, at lærarar ikki náa at geva hvørjum einstøkum næmingi nóg nógvan ans, tí at lærarin er í eini fimm toymum. Á summum skúlum hava leiðslurnar valt at hava ein toymissamskipara. Ein vandi kann vera, at ov nógv verður lagt á herðarnar á for-manninum, og at hini í toyminum bara verða eltarar. Leiðslan kann eisini velja ikki at hava nakran toymissamskipara, men at øll eru leiðarar. Fyrimunurin við hesum seinasta er, at allir lærarar taka ábyrgd og arbeiða í felag. Ein slík roynd bleiv gjørd á HH3 frá 2007 til 2009 á Føroya Handilsskúla. Hetta riggaði sera væl, tí øll tóku ábyrgd.

## Toymisarbeiði – trý prinsipp

Tá ið tú ert í einum toymi, hevur tað týdning at geva og at taka. Hvør einstakur eigur at tora at siga sína meining. Øll mugu tola, at teirra meiningar ikki altíð vinna, og at ein minnilutahugsan skal virðast. Um ein lærari í toyminum hevur trupulleikar, so hevur alt toymið "ein trupulleika" – uppgávurnar mugu lyftast í felag. Limirnir mugu hjálpa hvør øðrum, tá okkurt er áfatt, t.d. sjúka, strongd og skeið.

Vit kunnu siga, at tað eru trý prinsipp í toymissamstarvinum. Tað fyrsta prinsippið er, at tann sterkasti (tann, ið rópar harðast) í toyminum tekur avgerðirnar. Hetta er ikki ein gongd leið sum frálíður, tí at tað ger, at hini verða dølsk og líkasæl. Síðan hava vit tað fólkaræðisliga prinsippið, har tað verður atkvøtt um avgerðirnar. Her eru aftur nøkur, sum ikki verða vird, tí at meirilutin ræður. Tað triðja prinsippið snýr seg um at semjast um avgerðirnar. Her eru øll líka, øll eru sinnað at justera/broyta persónliga áskoðan og søkja semjur. Í veruleikanum hava øll møguleika at leggja veto, og øll hava felags ábyrgd av avgerðunum. Hetta er tað mest krevjandi prinsippið, men er helst tað frægasta.

## Toymið má gera sáttmála

Toymið má frá fyrsta degi gera ein sáttmála, hesin kann antin vera munnligur ella skrivligur. Ein slíkur sáttmáli kann t.d. byggja á felags linjur viðvíkjandi innlatingum, eftirmetingum, tvørfakligum samstarvi og skilhaldsreglum. Slíkar avtalur kunnu koma toyminum til góðar seinni, um t.d. okkurt stingur seg upp gjøgnum árið, t.d. nógv frávera, floksmentanin broytist o.s.fr. Sáttmálin má sjálvsagt kunna broytast gjøgnum skúlaárið.

## Toymisarbeiði - samskifti og fundarvirksemi

Sum nevnt, er ein sera týdningarmikil partur av toymisarbeiði gott samskifti. Fleiri lærarar eru av teirri fatan, at tá ið vit hava við toymisarbeiði at gera, so eru fundir lykilin til gott samskifti, og nógv fundarvirksemi er eins týðandi við gott toymisarbeiði. Samskifti kann fara fram aðrar vegir enn gjøgnum fundir, t.d. gjøgnum teldu, telefon, skype og óformligt

prát. Mínar royndir eru, at tað besta toymisarbeiði er, tá ið fáir fundir eru. Sjálvsagt kunnu mál stinga seg upp, sum ikki eru egnað til at samskifta um á annan hátt, og tá kann ein fundur koma upp á tal. Í 2007 varð ein royndarflokkur gjørdur úti á Føroya Handilsskúla, sum fekk navnið HH3. Toymið fyrireikaði royndarvirksemið, og gjørdi m.a. av, at fundar-virksemi mátti ikki vera ov nógv. HH3-toymið valdi heldur at samskifta øðrvísi, við m.a. teldu, óformligum práti og telefon. Sjálvsagt stakk okkurt seg upp, sum lærararnir máttu fundast um, men tá varð ein greið avtala gjørd, at fundirnir skuldu vera so stuttir og effektivir sum gjørligt. Toymið skuldi fyrireika seg væl til fundirnar.

Í fjør bleiv ein nøgdsemiskanning gjørd á Føroya Handilsskúla. Spurt var m.a. um fundarvirksemi:




Sum sæst, so helt ein meiriluti av lærarum, at ov nógvir fundir vóru á skúlanum. Hjá fleiri kennist fundarvirksemi køvandi, og tað drepur arbeiðshugin, tí at hetta gongur út yvir fyrireiking og fordjúping. Um vit hava tey introvertu og ekstrovertu í huga, so verða tey introvertu yvirstimulerað á fundum og eru troytt aftaná, tí at fundurin sýgur orkuna úr teimum. Tað kennist pínufult og køvandi. Tann introverti følir oftast, at fundir ikki eru til nakra nyttu og eru tíðarspilla.

Tey ekstrovertu hava tað øvugt, tey stórtrívast á fundum við nógvum tosi og eru væl fyri aftaná. Onkursvegna er fundarvirksemi fyri hesi ein lívsstílur. Niðanfyri er ein mynd, sum fleiri munnu kenna seg aftur í.




Tað er alneyðugt, at toymið ikki hevur fundir bara fyri at hava fundir.

## Um fundir skulu haldast

Um toymið velur at hava fundir um okkurt átrokandi, so skulu teir fyrireikast væl, t.d. skulu teir byrja til ásettu tíð, og luttakarar skulu vita, nær teir enda. Skilagott er, at teir ikki fara út um 15 minuttir, tí annars er vandi fyri, at teir gerast ineffektivir. Eitt tilmæli er, at til fundir skulu luttakararnir standa uppi, tí at annars er vandi fyri, at tað verður ov hugnaligt, og hetta kann gera, at fokusið hvørvur. Kanningar vísa, at um fólk standa á fundi, verður fundurin tríggjar ferðir so effektivur. Hann varir ein triðing av tíðini, sum hann hevði vart, um fólk sótu niðri, og avgerðirnar eru líka góðar.

Til hvønn fund skal skrá sendast út, so lærarar vita, hvat teir skulu fundast um. Á hesi skrá skal einki eita *ymiskt*, tað kann oyðileggja fundin. Tað er skilagott, at ein fundarstjóri verður settur til hvønn fund. Hesin skal lata orðaskifti um hvørt evni ganga natúrliga, og eigur at steðga kjakinum, tá ið fólk byrja at endurtaka seg sjálv ella fara av kós. Um hetta hendir, so skal hann hjálpa toyminum at koma til eina avgerð við at endurtaka høvuðs-boðskapin í kjakinum. Fundarstjórin sendir eina stutta fundarfrásøgn út eftir fundin, har skal ikki farast í smálutir, bert hvat toymið samtykti. Tað kann fyri summi kennast møtimikið við slíkum fundarfrásagnum, tí fleiri lærarar halda, at allir smálutir skulu í.

Slíkt má ikki koma fyri í eini fundarfrásøgn, har skal bara standa, hvat ið toymið hevur samtykt.

### Skúlaleiðslurnar mugu ganga á odda og skapa effektivitet

Tað hevur sera stóran týdning, at so lítið sum gjørligt er av fundum og fundarvirksemi í sambandi við toymisarbeiði. Vit hava góða tøkni, sum kann hjálpa, tá ið samskiftast skal í einum toymi. Leiðslurnar mugu eggja lærarum til ikki at hava ov nógvar fundir, tí at fundir og fundarvirksemi fara avstað við sera nógvari tíð, kosta sera nógv peningaliga og kunnu taka hugin frá lærarum. Skulu fundir haldast, so skulu teir vera stuttir og væl skipaðir.

## Keldur


http://bogs.wsj.com/speakeasy/2012/09/20/why-business-meetings-are-often-a-waste-of-time-and-productivity/

http://www.workfront.com/resources/infographic/9-reasons-meetings-suck-theyre-killing-productivity/

Nøgdsemiskanning á Føroya Handilsskúla 2014.

# Masterútbúgving í vegleiðing á Fróðskaparsetri Føroya

Elisabeth Holm

**Ein gamal dreymur er vorðin veruleiki. Tað var kenslan, ið fleiri fyrrverandi og virkandi vegleiðarar í føroyska útbúgvingarverkinum sótu við, tá master-útbúgving í vegleiðing á fyrsta sinni bleiv boðin út á sumri í 2013 og síðan sett í verk við lestrarbyrjan sama ár. Við hesi útbúgving eru vit ávegis til at nøkta ein tørv, ið við fleiri útbúnum vegleiðarum, sum frá líður, verður eitt framstig fyri føroyska útbúgvingarverkið og samfelagið sum heild.**

Stórur tørvur hevur leingi verið, og er, á útbúnum vegleiðarum í Føroyum, bæði innan fólkaskúla, miðnám, vinnuskúlar, aðrar skúlar, á Fróðskaparsetrinum og á arbeiðs-marknaðinum. Hóast vantandi førleikagevandi útbúgving innan fakið vegleiðing, so hevur lestrar- og yrkisvegleiðing í mong ár verið útint, serliga á størru fólkaskúlunum og á miðnámsskúlum. Virkandi vegleiðarar hava fingið okkurt styttri skeið av og á ímillum ár og dag, men holl førleikamenning til hesar uppgávur hevur ikki fingið neyðugu rað-festingina fyrr enn við nýggju útbúgvingini. Tað krevur holla fakliga barlast at røkja vegleiðarauppgávur til lítar á professionellan hátt, so tí er útbúgving ein neyðug íløga. Hetta hava skiftandi nevndir í Vegleiðarafelagnum og Skúlavegleiðarafelagnum víst útbúgvingarmyndugleikanum á. Ásannandi, at útbúgvingarmarknaðurin í Føroyum, í londunum rundan um okkum og um allan heim er vaksandi og í støðugari broyting, er bæði ein vaksandi tørvur og eitt stórt ynski um útbúgving til vegleiðarar vaksið fram. Til tess at nøkta henda tørv, og við stuðli frá Mentamálaráðnum, fór Setrið til verka saman við Háskóla Íslands og umboðum úr vegleiðaraumhvørvinum í Føroyum at leggja lunnar undir eina nútíðarhóskandi, granskingargrundaða vegleiðaraútbúgving. Útbúgvingin, ið hevur heimstað á Námsvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya, er skipað sum ein yvirbygningur á masterstigi, ið byggir á aðra viðkomandi útbúgving, ið er minst á bachelorstigi.

## Skipan av MA í vegleiðing

Útbúgvingin er skipað sum parttíðarnám í modulum. Parttíðarnám svarar til hálvtíðar-lestur, sum í arbeiðsbyrðu er mett at svara til umleið 20 arbeiðstímar um vikuna í miðal. Hon er sett saman av sjálvlestri, intensivum 3-daga skeiðum umleið tríggjar ferðir hvørja lestrarhálvu, uppgávuloysnum, kjaki í bólkum, framløgum, starvsvenjing, undirvísing og samskifti á netinum. Talan er um aktiva og blandaða læru, sonevnda “blended learning”.

Eisini málsliga er útbúgvingin samansett, tí bæði undirvísing og uppgávuskriving fara fram á enskum, skandinaviskum og í ávísan mun á føroyskum.

Fyrra ársverkið, ið er 2-ára lestur á tilsamans 60 ECTS[2], varð liðugt á sumri 2015. Tá fingu lesandi, ið høvdu lokið fyrsta partin, diplom á masterstigi. Nøkur valdu at gevast eftir lokið diplom, men umleið 25 lesandi hava valt at halda fram og taka seinna ársverkið. Full MA fevnir um 120 ECTS. Skeiðini eru býtt sundur í skeið (modul) á 15, 10 ella 5 ECTS. Hvørja lestrarhálvu hava skeið verið, ið tilsamans hava givið 15 ECTS. Nærri lýsing av hvørjari skeiðseind, við **læruúrtøkum** í miðdepli, eru at finna á: http://setur.fo/namsvisindadeildin/utbugvingar/ma-utbugving-i-vegleiding/skeidslysingar/

Yvirskipaða endamálið við vegleiðaraútbúgvingini er:

- At geva virkandi og nýggjum vegleiðarum hollan ástøðiligan kunnleika um vegleiðarayrkið
- At geva virkandi og nýggjum vegleiðarum amboð og møguleika at veita dygdargóða lestrar-, yrkis- og karrieruvegleiðing til fólk í øllum aldri, á øllum útbúgvingar-stigum og í mun til arbeiðsmarknaðarviðurskifti
- At menna, skipa og professionalisera vegleiðarayrkið, eins og siðvenja er í londunum rundan um okkum
- At skapa nýggja vitan um vegleiðing við at integrera gransking við praksis á skúlum, stovnum og á øðrum viðkomandi økjum

Útbúgvingin, ið er tvørfaklig, byggir á hugsjónina um lívslanga læru og evropeiskar leiðreglur og karmar fyri vegleiðaraútbúgvingar. Innihaldsliga fevnir hon m.a. um vegleiðaraástøði, samskifti og etikk, yrkisástøði (karrieruteoriir og tilgongdir), læruástøði, lestrartøkni, samfelags- og arbeiðsmarknaðarviðurskifti, viðkomandi løgfrøði, vísinda-ástøði, kunningartøkni, bólkaprocessir, persónligar trupulleikar, avbjóðandi samrøður og ymisk praksisamboð til m.a. eftirmeting, kanningar og fyriskipanir til fyribyrging av fráfalli. Í stuttum fevnir útbúgvingin um øll viðurskifti, ið hava við lestur, trivnað, lívslanga læru og val av útbúgving, yrki og karrieru at gera. Tá lesandi hava lokið 90 ECTS eftir trimum árum, verður farið undir masterritgerðina 4. árið, ið telur 30 ECTS. Á sumri í 2017 verða eftir ætlan fyrstu MA prógvini í vegleiðing handað í Føroyum. Við fyrstu master-ritgerðunum í vegleiðing verður latið upp fyri nógv neyvari vitan og gransking innan evni, ið hava við vegleiðing, útbúgving og arbeiðsmarknaðarviðurskifti at gera, enn vit hava havt

---

[2] Stytting fyri "European Credit Transfer and Accummulation System", ið eru námsstig, ið siga nakað um vavið á útbúgvingini. Sí ECTS vegleiðingina (2015) á: http://ec.europa.eu/education/ects/users-guide/assets/ects_users-_guide_web.pdf

frammanundan. Neyðugt er áhaldandi at byggja vitan upp innan vegleiðing og framleiða tilfar, ið tekur støði í føroyskum viðurskiftum.

## Undirvísing og faklig leiðsla

Fakligur útbúgvingarleiðari er Sif Einarsdóttir, professari við Háskóla Íslands og adjungeraður professari við Fróðskaparsetur Føroya. Hon er útbúgvingarleiðari á íslendsku vegleiðaraútbúgvingini og samskipar norðurlendska VALA-netverkið, ið er eitt Norðpluss netverk, ið samstarvar um útbúgving av vegleiðarum í øllum norðurlondum[3]. Umvegis hetta netverk hevur útbúgvingarleiðarin fingið fremstu serfrøðingar innan vegleiðing úr øðrum norðurlondum aftur at sær at undirvísa. Harafturat undirvísa fakfólk innan ávís øki á Fróðskaparsetrinum (t.d. innan sálarfrøði, samfelags- og arbeiðs-marknaðarviðurskifti) eisini á útbúgvingini. Av tí orsøk, at flestu lærubøkurnar eru á enskum máli, og at undirvísingin lutvíst fer fram á enskum, er neyðugt at hava førleikar í enskum. Tí var góður førleiki í enskum máli ímillum upptøkutreytirnar, ið annars eisini fevndu um praktiskar royndir innan vegleiðarayrkið og útbúgving á bachelorstigi ella hægri.

Umframt at vera samskipari av norðurlendska VALA-netverkinum, er útbúgvingar-leiðarin, Sif Einarsdóttir, limur í evropeiska Erasmus NICE-netverkinum, ið er stytting fyri "Network for Innovation in Career Guidance and Counselling in Europe"[4], ið fevnir um samstarv um vegleiðaraútbúgvingar á umleið 45 hægri lærustovnum í 29 londum í Evropa. Netverkið hevur arbeitt við felags ásetingum, harmonisering av kjarnuøkjum, førleika-standardum, innihaldi, góðskukrøvum, professionalisering, leiðreglum, kørmum v.m. viðvíkjandi vegleiðaraútbúgvingum á masterstigi. Føroyska vegleiðaraútbúgvingin tekur støði í teimum viðtøkum, ið NICE-netverkið hevur stungið út í kortið. Niðanfyri er mynd av teimum kjarnuførleikunum, ið semja er um á evropeiskum stigi, at ein professionell vegleiðaraútbúgving skal fevna um[5].

---

[3] Les um VALA netverkið á: http://www.peda.net/en/portal/vala
[4] http://nice-network.eu/the_nice network.html
[5] Christiane Schiersmann et al. (eds.), **Nice Handbook for the Academic Training of Career Guidance and Counselling professionals.** NICE 2012




## Hví raðfesta vegleiðing?

Allir næmingar, lesandi og arbeiðstakarar eiga at hava í boði at fáa holla vegleiðing. Útbúgvingarpolitikkur og tilmæli, ið byggja á gransking í londunum rundan um okkum, vísa, at professionell vegleiðing og samskipaðar vegleiðaratænastur eru ein góð samfelagsíløga. Vit liva í einum globaliseraðum heimi, har arbeiði og viðurskifti á arbeiðsmarknaðum eru í støðugari broyting, og krøv til útbúgving, eftirútbúgving, karrieru, førleikamenning og arbeiði eru alsamt skiftandi. At finna stevið og navigera í hesum meldri er fyri mong ein stór avbjóðing, og tí er tað ikki uttan orsøk, at londini rundan um okkum í nógv áratíggju hava raðfest vegleiðing og útbúgving av vegleiðarum. Lívslong læra er ein veruleiki, og tí kann eingin stagnera og framvegis varðveita sína støðu á arbeiðsmarknaðinum. Krøvini til einstaka menniskjað eru alsamt vaksandi og gerast fleiri. Til tess at tryggja tí einstaka eina holla, rætta og góða vegleiðing, ið ber á mál í einum umskiftiligum heimi, krevst hollur fakligur førleiki. Tí er útbúgving av vegleiðarum neyðug. Samskipað og dygdargóð vegleiðing og professionellar vegleiðaratænastur eru neyðugar bæði innan allar sektorar í útbúgvingarverkinum og í arbeiðsmarknaðarhøpi, m.a. tí tær fremja læring, økja um trivnað, og kunnu, um dygdin er í hásæti, minka um fráfall í útbúgvingum. Sostatt er vegleiðing ikki bert er ein tænasta til einstaka menniskjað, men tænir øllum samfelagnum sum heild. Eins og tørvurin á útbúgvingarvegleiðing er stórur og vaksandi, so er ein tilsvarandi stórur tørvur á karrieruvegleiðing fyri tilkomin. Her verður serliga hugsað um yrkisvegleiðing í sambandi við yrkisleið, førleikamenning, vaksnamannaútbúgving, integratión, endurútbúgving, rehabilitering, arbeiðsloysi, og serligan tørv í tí føroyska samfelagnum. Enn er eingin heildarskipan fyri vegleiðing sett á

stovn, men tað verður tað vónandi í næstum. Við útbúnum vegleiðarum hava avvarðandi myndugleikar fakfólk og resursir tøk í landinum, sum saman við myndugleikum kunnu menna hetta økið.

Hyggja vit at útbúgvingarpolitikki í bæði evropeiskum londum og norðurlondum, síggja vit, at á mongum økjum verður staðiliga mælt til, at vegleiðing verður veitt innan allar sektorar sum ein integrerað stuðulstænasta og eitt amboð til menning og læring. Krøv um vegleiðing finna vit í kunngerðum og lógarverki innan føroyska útbúgvingarverkið, men eingi beinleiðis krøv ella ásetingar eru um útbúgving á økinum. Við útbúnum vegleiðarum verða vit betur før fyri at lúka tær ásetingar, ið longu eru ásettar innan útbúgvingarverkið.

Eitt ítøkiligt dømi um evropeiskan politikk er at finna í felags leiðreglum um góðsku-skipanir fyri universitet í Evropa[6], har til dømis mælt verður til, at eingin nýggj útbúgving verður sett á stovn uttan at lestrar- og karrieruvegleiðing inngongur sum ein natúrligur og integreraður partur av teimum stuðulsskipanum, ið skulu verða tengdar at eini útbúgving. Men til tess at veita tílíkar stuðulstænastur krevst útbúgving. Tí hevur tað so ómetaliga stóran týdning, at vit í Føroyum eisini taka hesar stuðulstænastur í álvara og útbúgva fólk til hetta økið, ið er sera fjøltáttað. Uttan útbúgving ber ikki til at professionalisera vegleiðaraøkið. Uttan lívslanga vegleiðing ber í veruleikanum ikki til at fremja lívslanga læring – talan er um tvær síður av somu søk. Harafturat hanga útbúgving og arbeiðs-marknaður óloysiliga saman. Í fleiri av londunum rundan um okkum hevur vegleiðing ment seg til eitt tvørgreinaligt fakøkið, ið nógv hevur verið og verður granskað í – hetta bæði einstaklingum og samfelagnum at gagni. Óteljandi kanningar og granskingarúrslit vísa á nyttuvirðið á professionellari vegleiðing. Tí er útbúgving av vegleiðarum ein neyðug íløga fyri samfelag okkara, og tvørfakligt samstarv við allar áhugabólkar alneyðugt.

## Framtíðin

Neyðugt er at menna eina heildarskipan fyri lívslanga vegleiðing (LLG), ið vónandi verður ein integreraður partur av útbúgvingarpolitikki landsins. Nú masterútbúgving er sett á stovn á Setrinum, eru dyr lætnar upp fyri framtíðarmenning av hesum øki og sam-virkanarárini á fleiri økjum. Um rætt verður borið at, og útbúgvingin fær sømdir til at halda fram, ber til at integrera trý kjarnuøki, ið eru hornasteinar á universitetum: tað er gransking, førleikamenning av vegleiðarum og samfelagsávirkan. Útbúgvingin, og framhaldandi menning av henni við støði í føroyskum viðurskiftum, kann gerast ein vinn-vinn støða fyri føroyska samfelagið. Útbúnir vegleiðarar kunnu geva íkast til kanningar og gransking innan vegleiðing, og somu aktørar kunnu stuðla myndugleikum við menning av útbúgvingar-, arbeiðsmarknaðar- og vegleiðarapolitikki og strategi, ið tæna øllum

---

[6] Standards and Guidelines for Quality Assurance in the European Higher Education Area (ESG), sí: http://www.enqa.eu/wp-content/uploads/2015/05/ESG_endorsed-with-changed-foreword.pdf

útbúgvingarverkinum og føroyska arbeiðsmarknaðinum. Harafturat er framhaldandi neyðugt at menna og professionalisera vegleiðing í Føroyum. Nær útbúgvingin verður boðin út aftur, vita vit ikki, men staðfestast kann, at tørvurin er støðugt til staðar, stórur áhugi er fyri MA í vegleiðing, og professionalisering av vegleiðarum er ein alneyðug samfelagsíløga. Vónandi fær vegleiðaraútbúgvingin, ið er eitt framstig fyri føroyska samfelagið, vakstrarkor, ið framhaldandi kunnu menna hetta yrkið og finna ta kós, ið tænir øllum borgarum.

# Viðtal við íslendskan miðnámsskúlalærara

Tórður Johannesarson

**Ásdís Arnalds er 39 ára gomul. Hon tók studentsprógv frá Kvennaskólanum í Reykjavík (1995). Tók so BA-prógv í íslenskum frá Háskóla Íslands (1999). Síðan námsfrøðiligu útbúgvingina við Háskólann á Akureyri (2001). Hon hevur eisini tikið M.Paed.-prógv frá Háskóla Íslands (2006). Hon hevur arbeitt sum lærari við Kvennaskólann í Reykjavík síðan 2002.**

**1. Hvussu mangir miðnámsskúlar eru í Reykjavík/Íslandi (tekniskir skúlar, handilsskúlar og studentaskúlar)?**

37 skúlar bjóða fram miðnámsskúlaútbúgving (sí http://www.menntagatt.is/skolar/).

**2. Hvussu  mangir næmingar eru í skúlanum, har tú starvast?**

Umleið 650 næmingar.

**3. Hvussu stórur partur av næmingunum í 9.-10. flokki fara í miðnámsskúla í Íslandi?**

Árið 2013 fóru til dømis 97% beint í miðnámsskúla.

**4. Í Føroyum eru um 80% av frálærutilfarinum á donskum. Hvussu er støðan í Íslandi hesum viðvíkjandi, til dømis lutfallið millum  íslendskt og enskt tilfar?**

Tað er sera trupult er at svara hesum. Frálærutilfarið er yvirhøvur á íslendskum uttan í fremmandamálslærugreinum. Tó kemur fyri, at bøkur og annað frálærutilfar, til dømis enskum, verður nýtt í ymsum øðrum lærugreinum. Eg veit ikki, um nakar hevur kannað hetta.

**5. Í Føroyum skalt tú í minsta lagi hava bachelor/kandidat ella master til at undirvísa í miðnámsskúla. Hvussu er í Íslandi?**

Viðkomandi skal hava prógv frá lærdum háskúla (í minsta lagi bachelor) og skal harafturat hava lokið námsfrøðiliga útbúgving.

**6. Hvussu útbúgva miðnámsskúlalærarar í  Íslandi seg? Lærarar frá Syddansk Universitet koma til Føroya at undirvísa føroyskum miðnáms-skúlalærarum. Hetta tekur eitt ár, og ástøðiligi parturin av útbúgvingini**

**verður tikin, meðan lærararnir undirvísa vanliga tímatalvu. Móti endanum verður ritgerð skrivað um námsfrøðiligt evni. Í verkliga partinum fara lærarar sum oftast til Danmarkar at undirvísa í einar 10 vikur í donskum miðnámsskúla og verða síðan eftirmettir. Hvussu er samsvarandi námsfrøðilig útbúgving skipað í Íslandi?**

Lærarar skulu í minsta lagi hava lokið bachelor-prógv í lærugreinini ella skyldari lærugrein (ella ávísum faknámi, um talan er um verkliga lærugrein). Tey flestu hava tó tikið masterprógv. Eisini skal lærarin taka námsfrøðiliga útbúgving. Ein liður í útbúgvingini er verkligur partur, sum verður tikin í øðrum skúla, har „lærаranæmingurin" fær ein vegleiðara, sum hevur neyðugu útbúgvingina. Læraranæmingurin skal í eitt skúlaár sita sum eygleiðari inni í tíma hjá fulltiknum lærara (32 ferðir 40 minuttir) og undirvísa sjálvur (20 ferðir 40 minuttir). Tey, sum hava bachelor-prógv, taka 2 ára námsfrøðiliga útbúgving, men tey, sum hava masterprógv, taka 1 árs diplomútbúgving.

**7. Í Føroyum gevast 15-20% av miðnámsskúlanæmingunum á hvørjum ári. Hvussu er í Íslandi?**

Eg haldi, at samanumtikið kann sigast, at í hvørjum árgangi gevast uml. 20%, men tá tala vit um øll árini, sum útbúgvingin tekur. Her er til dømis skjal frá Hagstofu Íslands, sum sýnir, hvussu mong í hvørjum árgangi tóku útbúgving (og tey, sum góvust) árini 1999-2007: https://skrif.hi.is/dropin/files/2008/06/01hagstofa.pdf.

**8. Hvussu stórur partur av fólki við miðnámsskúlaútbúgving fara undir hægri lestur?**

Umleið 35% fara undir hægri lestur her á landi.